23 oljufeløg við í „fyribils“ lisensumfarinum:

-Eg eri væl nøgdur

Heili 23 oljufeløg kunnu longu nú peika út teigar á føroyska landgrunninum, har tey kundu hugsað sær at gjørt meira nágreiniligar kanningar og seinni borað eftir olju. Hesir teigar liggja spjaddir og eru tískil ikki bert á einum avmarkaðum øki við markið, sum fleiri higartil hava hildið og borið ótta fyri.

Jan Muller

Tilsamans 23 oljufeløg hava svarað føroysku oljumyndugleikunum, hvørjar teigar á landgrunninum tey halda vera áhugaverdar í einum komandi loyvisumfari.

Tey 23 feløgini hava latið inn tilsamans 12 ymiskar nominatiónir.

Martin Heinesen, leiðari av Oljufyrisitingini sigur við Tíðindablaðið Sosialin, at hann er sera væl nøgdur við úrslitið. Hann leggur dent á, at talan er um eitt heilt opliktandi tiltak fyri báðar partar.

Endamálið við hesum er at fáa oljufeløgini at peika á teir teigar, sum tey við núverandi vitan halda eiga at vera við í ti fyrsta útbjóðingarumfarinum um eitt ár.

Hetta skal so aftur hjálpa føroysku oljumyndugleikunum at betri at kunna leggja til rættis fyrsta útbjóðingarumfarið.

Martin Heinesen sigur, at talan er um seks bólkar ella samtøk, sum hava latið inn tilmæli. Í hesum bólkum eru 2, 3 ella 4 oljufeløg.

Hetta merkir, at fleiri av oljufeløgunum, sum ikki eru í samtøkum, antin eru farin uppí verandi samtøk ella hava sett saman nýggj samtøk - ella hava á opliktandi grundarlag latið tilboð inn saman við øðrum.

Eftir ti sum Sosialurin skilur, so hava tað higartil verið 5 samtøk, umframt einstøk feløg, sum hava víst áhuga fyri føroysku undirgrundini.

Hesi samtøkini eru: Amerada bólkurin við oljufeløgunum Amerada Hess, Dong, Norsk Hydro og Lasmo. Har er AMG-bólkurin við Statoil, Mobil og Enterprise. Síðani er har Fina-bólkurin við Fina Petroleum, Maersk Olie og Gas, Union Texas Oil og Deminex. Síðani hava vit Texaco-bólkin við Texaco og Conoco og at enda hava vit BP og Shell, sum arbeiða saman á føroyaøkinum uttan tó at hava skipað seg í ein bólk.

Her er talan um fimm bólkar við tilsamans 15 feløgum. Við øðrum orðum eru 8 feløg, sum ikki eru við í teimum bólkum, ið higartil eru kendir.

Fara at almannakunngera teigarnar í næstum

Hvørji feløgini eru, sum eru komin við tilmælum, vil Oljufyrisitingin ikki upplýsa. Tað mugu feløgini sjálv upplýsa, um tey ynskja tað, Martin Heinesen sigur

Gaman ella álvara. Leitingarstjórin hjá BP á Atlantsmótinum Tom Fife við blaðmannin. Her er oljan. Aftanfyri Magni Arge, limur í Oljuráðleggingarnevndini, sum í næstu viku fer at hyggja nærri at tilmælunum frá oljufeløgunum.

annars, at tá Oljuráðleggingarnevndin hevur viðgjørt alt tilfarið einaferð í næstu viku, verður helst kort almannakunngjørt yvir allar teigarnar. Vit fáa so heldur ikki at vita, um allir teir bólkarnir, sum higartil hava víst Føroyum áns, eru millum teirra, sum hava svarað.

Feløg, sum blaðið veit, eru sera áhugað í føroyska økinum og sum tí helst eru millum tey 23, ið hava svarað, eru Saga Petroleum, Phillips Petroleum, Brittish Gas, Amoco, Esso, Chevron ELF og BHP. Oljufelagið Arco hevur annars boðað alment frá, at tað er við. Leggja vit so saman verður samlaða talið av feløgunum, sum her eru nevnd, 24. Onkur ábending hevur verið frammi um, at Chevron av ávísum orsøkum, sum einki hava við Føroyaøkið at gera, møguliga ikki verður við. Hetta hava vit ikki fingið váttað.

Tað er tó eingin, sum sigur, at tað verða hesi ella bara hesi umrøddu 23 feløgini, sum vera við, tí avfornar. Eisini kunnu onnur feløg, sum enn ikki hava gjørt vart við seg, vera við tá. Samanumtikið kann tó sigast, at øll tey stóru oljufeløgini í heiminum tykjast hava áhuga fyri at vera við í fyrstu føroysku lisensrundini.

Fleiri áhugaverd øki

Martin Heinesen sigur annars, at oljufeløgini hava víst á fleiri áhugaverdar teigar og øki ymsa staðni kring Føroyar. Hesir teigar liggja spjaddir og eru ikki so konsentreraðir, sum higartil hildið, váttar hann.

Hvat viðvíkur tilfarinum, sum tey ymsu feløgini eru komin við, er tað sjálvandi ymiskt, hvussu nógv feløgini hava at upplýsa. Tey feløgini, sum hava arbeitt her leingi, eru komin longur ávegis, enn tey, sum júst eru byrjað. Tað vil so vera.

Uppá fyrispurning um ein kann rokna við, at øll tey feløgini ella bólkarnir, sum ætla sær av vera við í 1. útbjóðingarumfarinum, fáa loyvi svarar Martin Heinesen, at hetta er ov tíðliga at siga nakað um nú.

Men hann vónar sjálvandi, at vit fara at fáa nógvar umsóknir, sum kunnu metast skilagóðar frá bæði okkara og teirra síðu. Talan verður at tilluta blokkar, har feløgini so arbeiða við nøkrum arbeiðsprogrammum yvir so og so nógv ár.

Nú verður so arbeitt við grundarlagnum undir øllum hesum, m.a. løggávu og reglugerð fyri eina komandi lisensrundu.

Flestu av hesum feløgunum eru við í „nýndarlisensumfarinum“.

Saga keypt Santa Fe

Norska oljufelagið Saga Petroleum hevur keypt bretska oljufelagið Santa Fe. Keypið vísir at norska felagið hevur stórar vónir til oljuleitingina í føroyskum og bretskum sjógvi

Í Oslo: Jógvan Hugo Gardar

Saga Petroleum skal leggja millum sjey og átta milliardir norskar krónur á borðið fyri Santa Fe. Fyri knøppum ári síðani varð hetta felagið virðismett til umleið 3,9 milliardir, og serfrøðingar roknaðu ikki við at prísurin vildi fara uppum fimm milliardir, tá kuvaitisku eigararnir løgdu felagið út til sølu í summar.

Keypið er tað næststørsta keypið eitt norskt felag hevur gjøgnumført í útlandinum. Saga vil nú framleiða umleið 190.000 oljuføt um samdøgurði.

Atlantsmótið í huganum

Saga hevur í longri tíð umhugsað at keypa seg inn á bretska oljumarknaðin, og nú var møguleikin har. Serfrøðingar meta at Saga hevur brúkt óvanliga nógvar pengar fyri at tryggja sær Santa Fe. Men eingin torir at siga at hetta skuldi ikki verið gjørt, tí møguliga veit Saga meir um framtíðarútlitini á Atlantsmótinum enn flest onnur. Keypið er ein partur av framtíðarútilrættaleggingini hjá felagnum í Norðsjónum og á Atlantsmótinum.

Í einum tíðindaskrivi frá Saga mikudagin 4. desember, verður dentur lagdur á, at umráðini norðantyri Hetland, eystantyri Føroyar og vestantyri Írland líkjast, og at Saga kann brúka egnar royndir frá sínum oljuvirksemi í norskum øki.

Saga upplýsir eisini at teir hava keypt Santa Fe fyri at tryggja sær at felagið skal vera væl fyri tá bjóðast skal uppá komandi oljuleitingarøkir íBretlandi, Írlandi og Føroyum.



Tá Patrick Haggarty - fyrsta seismikkskipið var á Havnini fyri nøkrum árum síðani útpeikaði ein av geofysikkarunum hetta økið sum áhugavert. Nú fáa vit so at siggja, hvat oljufeløgini siga.